Seminar:

# Oljuprísirnir - enn ein avbjóðing

**»Oljuprísirnir - enn ein avbjóðing« er heiti á seminari í Útvarpshøllini fríggjadagin 16. september kl 13:00**

BÚSKAPUR

Búskaparfrøðingarnir Óli Samró, Teitur Poulsen og Magni Laksafoss viðgera, hvussu oljuprísirnir kunna ávirka fiskivinnuna og føroyska búskapin komandi árini.

Teitur Poulsen, oljubúskaparfrøðingur hjá Faroe Petroleum, metir um útlitini fyri oljuprísinum í komandi tíðum. Hann kemur at viðgera, um samfelagið skal laga seg eftir einum høgum oljukostnaði í framtíðini. Dentur verður lagdur á at lýsa útboð, eftirspurning og møguleikarnar at finna nýggjar keldur. Í Aberdeen arbeiðir hann dagliga við tí, sum rørir seg á oljumarknaðinum.

Óli Samró fer at leggja fram metingar um, hvussu oljuprísirnir ávirka raksturin hjá føroyska fiskiflotanum í 2005 og 2006. Við grundarlagi í datagrunninum "Nemo" og roknskapartølum fyri føroyska fiskiflotan verður mett um úrslitinini hjá teimum ymisku veiðubólkunum.

Magni Laksafoss fer at leggja fram, í hvønn mun oljuprísurin ávirkar føroyska búskapin. Hann granskar í løtuni sambandið millum oljuprísir og føroyskan búskap.

Aftan á framløgurnar verður pallorðaskifti.

Orðstýrari er útvarpsmaðurin Jóhann Mortensen.

# Tillagingin - eitt gandaorð ella ein trongdur veruleiki

**Í vetur fer FAREC undir eina nýggja seminarrøð. Evnið er: »Tillagingin til heimssamfelagið - eitt gandaorð ella ein trongdur veruleiki«**



BÚSKAPUR

- Føroyar hava ikki lagað seg eftir broyttu umstøðunum í heimssamfelagnum. Livistøðið er á veg at lækka munandi - kanska eina helvt av tí í Íslandi og Danmark um fá ár. Hetta sigur Farec International í tíðindaskrivi.

Búskaparfrøðingar hava í nógv ár tosað um »tillagingar«. Lítlar og ongar tillagingar eru hendar í nógv ár. Tey, sum virka í fiskivinnuni, síggja ongar tillagingar, tey spyrja, hvar alternativini eru, og hví tey lærdu fólkini onga tillaging fremja. Tunglyndi er yvir fiskivinnuni.

Løgmaður hevur sett eina 2015-ætlan út í kortið. Hann vil, at Føroyar skulu í fremstu røð.

Ávirkanin á Føroyar frá globaliseringini og broytingarnar í altjóða búskapinum er ein avbjóðing, sum FAREC hevur avgjørt at viðgera í vetur.

Nøkur evni, sum verða viðgjørd á seminarrøðini í vetur, eru:

• Hvat og hvørjum liva vit av nú - og hvørjum skulu vit liva av í framtíðini?
• Er fiskivinnan liðug?
• Hvussu fyribyrgja vit, at livistøðið verður helvtina av tí í Íslandi og Danmark?
o Er nakar møguleiki uttanfyri ES - er EFTA loysnin?
• Hava fakfeløg ov stóra makt í mun til politikarar og vinnulívsfólk?
• Kann tann breiðkandi gjógvin millum samfelagsbólkar steðgast?
• Hví eru so fá høgt útbúgvin fólk í privatari vinnu - hvør er trupulleikin?
• Hví er meginparturin lønmóttakarar - hvar eru entreprenørarnir?
• Hví eiga útlendingar og tað almenna meginpartin av føroysku vinnuni?

## FAREC International

Virksemið hjá FAREC International er at virka og veita ráðgeving á altjóða pallinum. Virksemið er nú úr Hollandi. FAREC International bjóðar at veita tænastur og ráðgeving til føroysk virkir, ið virka ella umhugsa eisini at virka uttan fyri Føroyar. FAREC International veitir m. a. ráðgeving um búskap, marknað, business-development, at finna íleggjarar og eisini um ES-viðurskiftir. FAREC hevur 15 ára royndir og eitt netverk, sum røkkur um allan heim.

## Skrá og tilmelding

Skrá og tilmelding er á www.farec.fo.

Serlig avtala verður gjørd fyri skúlar og aðrar felagsskapir.

Meira kann fáast at vita frá: Óla Samró, tel. 0031 703388004, 0031 646080 833 (mob) ella 217895 (mob FO) Teldupost: farec@farec.fo.

KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag



Vika 37, 2005
www.kaupthing.fo

# Oljuprísurin verandi høgur

MARKNAÐARRÁK

Oljuprísurin er hækkaður nærum 60% í ár, og liggur nú um 63 dollarar fyri tunnuna. Stigið er so mikið høgt, at tað av álvara merkir ídnaðin og fíggjarmarknaðirnar. Eftirspurningurin eftir ráolju er øktur 10% síðan 2000. Framleiðslan er fylgd við, men tað er lítil eyka kapasitetur at dúva uppá. Tað ger, at yvirgangur, ódnir o. a. gera oljukeyparar bangnar fyri, at framleiðslan minkar, og tí vilja teir rinda meir fyri oljuna enn áður. Útlit eru ikki fyri, at OPEC ella aðrir oljuframleiðarar fara at framleiða munandi meir í bræði, og sannlíkt er, at eftirspurningurin fer at hækka. Tí meta vit, at meiri sannlíkt er, at oljuprísurin fer at hækka heldur enn lække varandi komandi hálva til heila árið, hóast einstakar lækkingar á 20%-30% kunnu koma fyri í styttri tíðarskeið. Les greiningina "Ven teg við høgan oljuprís" á www.kaupthing.fo.

## Lánsbrævarentur hildu sær lágar

Danska 10-ára rentan helt sær beint oman fyri 3,00% í farnu viku. Sostatt hava lánsbrævarenturnar ikki funnið nakað rættiligt rák enn. Henda rákleysa støða hevur nú vart í 3 mánaðir (sí mynd), og hevur ført við sær, at fleiri realkredittlánsbrøv hava givið góð avkast.

## Partabrøv stóðu seg væl

Partabrævamarknaðirnir stóðu seg væl í farnu viku, og høvuðsmarknaðirnir rundan um okkum hækkaðu um 2%. Ein av orsøkunum til hetta er, at Brentoljan lækkaði um 5% í farnu viku, m.a. tí líkt er til, at ein mynd nú er fingin av oyðileggingunum eftir ódnini Katrinu. Nú oljuprísirnir veruliga eru í andglettinum, vil oljurprísgongdin ávirka gongdina á partabrævamarknaðunum.

## Hesa vikuna

Hesa vikuna koma fleiri lyklatøl, sum hava týdning fyri dollarakursin. Týdningarmest eru prísvøksturin bæði í USA og Evropa, sum gevur ábendingar um stuttu rentuna, umframt amerikanski handilsjavnin.

Nú fleiri partabrævamarknaðir aftur eru á sera høgum stigi, kann hetta føra við sær vinningsstaðfesting. Hetta kann geva keypsmøguleikar, tí útlitini eru framvegis góð.

**Donsk 10-ára renta**




**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| USD | 600,69 | 0,9% | ↑ |
| JPY | 5,48 | 1,1% | ↑ |
| GBP | 1.104,80 | 0,8% | ↑ |
| NOK | 95,73 | 0,1% | ↑ |

**Íløgufeløg**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 105,96 | 1,0% | ↑ |
| Evru Lánsbrøv | 176,83 | 0,0% | → |
| Norrøn Partabrøv | 99,23 | 0,0% | → |
| Altjóða Vøkstur | 66,77 | 2,3% | ↑ |

*Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðirnar.*